**KARISMA. Vit eru øll ein partur av einari kristnari uppaling, men tað er í hvussu er ongin av hesum andaligu retorikarunum, sum skal siga mær, hvussu mín samvitska skal hava tað, um eg velji at gera okkurt, sum ikki passar inn í teirra smalsporaða hugsanarhátt, sigur Oddfríður Marni Rasmussen í hesi hugleiðing um andaligan retorikk í føroyskum miðlum**

# Gud er deyður

HUGLEIÐING

*Oddfríður Marni Rasmussen*



*Oddfríður Marni Rasmussen, rithøvundur: Átrúnaður er eitt persónligt val og hugtakið Gud er relativt*

Týski heimspekingurin Friederich Nietzche pástóð fyri umleið 120 árum síðani at "Gud er deyður". Ja, tann pástandurin kann so standa sína roynd. Um vit nú hyggja at tí føroyska samfelagnum í dag, so eri eg sannførdur um at Gud er deyður! Í hvussu so er tann Gud, sum skal eitast at læra okkum, at bera okkum rættvíst at og virða næsta okkara. Hesin sami Gud lat fjølritið av sær, prædika orð sítt, so at øll menniskju skuldu trúgva á hann og ikki glatast, men hava ævigt lív. Ja, ja, tað ljóðar alt so hugnaligt og gott, men í roynd og veru, er myndin ein onnur. Tí um hesin Gud er til, er ógvuliga sannlíkt, at hann doyði av látri, tá ið hann varnaðist, at hann hevði skapt lítla Føroyar.

Hyggja vit eftir teimum sum kalla seg kristin - tey sum hvønn fríggjadag, leygardag og sunnudag í vikuni ganga í eina ella aðra samkomu, sær myndin øðrvísi út. Siga vit, at umleið 30% av føroyingum eru við í einari ella aðrari samkomu, so eru 70% eftir, sum antin eru kirkjufólk ella av onkrari aðrari átrúnaðarligari sannføring. Her skal líka viðmerkjast, at kanska síggja tølini ikki akkurát soleiðis út, og heldur ikki skulu øll tey sum ganga á møti, gerast so ring sum eg her skrivi. Tey hava helst eitt persónligt og avslappað samband við trúgv sína.

Tey 30 prosentini hava til endamáls at prædika fyri teimum 70 prosentunum, at okkurt er, sum er rætt og okkurt sum er skeivt - mest at okkurt er skeivt, og tey sum ikki játta sína trúgv eru glataði og enda hjá hinum grábeinta. Onki serliga pedagogiskt vildi eg sagt. Fyri at seta henda trupulleikan øðrvísi upp, so vil eg loyva mær at skriva eina samanlíkning: Um ein katolikkur, ein lutheranari og ein muslimur gera somu skemdargerð, nevniliga at stjala, lat okkum siga, eina gularót, hendir nøkulunda hetta; at katolikkurin skal á skriftarstólin fyri at lætta um sína egnu samvitsku. Straffurin, sum hann fær er tann, at hann skal fara heim og siga einar tvær ferðir Ave Maria, og so er henda syndin registrerað. Tá ið hann so einaferð doyr, verður roknað út hvussu langur syndalistin er, so hesin kann fáa at vita um hann endar her ella har. Men hann sleppur so av við ta ringu samvitskuna, meðan hann er her á jørðini.

Lutheranarin fær at vita, at hann hevur syndað, og at hann, tá ið tíðin kemur, skal fáa tað trupult at sleppa inn í himmiríkið, og má tí liva við syndabyrðuni í allar ævir og nakað væl aftrat. Straffurin hjá musliminum er tann, at hann missir ta hondina, sum hann hevur stolið gularótina við, so at tað sæst, um hann hevur syndað, tá ið hann einaferð stendur framman fyri Allah.

Óansæð hvørjum endamáli gularótin tænir, so er straffurin, synd, synd og aftur synd. Sjálvt um tað var ein hungurstungin menniskja, sum ikki hevði etið í fleiri dagar. Menniskjan ber fleiri møguleikar at fyrigeva innan í sær. Eg vildi skotið upp, at brúkt teir, tí vit liva hóast alt í 2001. Her skal sigast, at óansæð hvør av áðurnevndu átrúnaðum menniskjan hevur trongd til at trúgva, so er tað tann ringa samvitskan sum er drívmegin.

Well! Fyri at fara aftur til tey 30 prosentini, so er teirra endamál at fáa so nógv við í himmalvognin sum gjørligt, og til hetta endamálið verður retorikkur brúktur. Hesin retorikkur verður brúktur til at sannføra hini 70 prosentini, at tey eru átrúnarliga avsporaði, ella sum sagt verður um okkum: At vit synda og eru ævigt glataði. Nógv av hesum 70 prosentunum hava veikar løtur - eru sinnisliga í ójavnvág - og tá er lætt at ræna hesar sokallaðu glataðu sálir "heim til sín".

Út frá hesari eygleiðing, kann sigast at standurin versnar, og tað er ikki betri, at allar tríggjar útvarpsrásirnar í Føroyum, eisini hava tikið hetta prædikka-og-fá-ein-aftrat-uppí-himmalvognin prinsippið til sín. Ein morgunin hoyrdi eg umboð fyri somu loftmiðlar siga, at 80 ella 90 prosent av føroyingum eru trúgvandi, so hví ikki brúka útvørpini til at bera boðskapin út millum fólk.

Eg royni ikki at prædikka fyri øðrum um mína átrúnaðarligu sannføring ella mangul uppá sama (tó er hetta glepsið eitt undantak), so hví í verðini skal eg lastast við hesum orðaskvaldri. Tað er næstan so, at hvørjaferð eg taki uppvaskibustina í hondina, so er ein ellar annar klappari, sum hevur boðið konuni ella onkrum øðrum í familjuni í studio, at siga Føroya fólki, hvussu tað skal skikka sær her á jørð, so at tað kann fáa fremsta rað fyri seg, tá ið onkur nú einaferð ikki er millum okkum deyðiligu.

Við hesum glepsinum vil eg ikki pástanda, at fólk ikki skulu vera trúgvandi. Nei! Men hví ikki hava eitt avslappað samband við átrúnað? Hví skulu summi lastast fyri ikki at hava somu trúgv sum onnur? Eg eri troyttur av at fólk pranga nakað uppá meg, sum eg vil hava fyri meg sjálvan. Øll kenna vit vitnini hjá Jehova, sum buka á dyrnar dag um dag, og sum hava hvørt húsarhald í Føroyum skrivað niður, í eina bók til læstar dyr og eina bók til stongdar dyr. Eisini kenna vit Frelsunnarherin. Hesi sum standa á útvaldum støðum og bjóða fólki at vakna ella ikki. Tey eru minni ágangandi, tí at tey lata tey sum ganga framvið sjálvi velja, um tey vilja lesa tíðarrit teirra ella ikki. Nærvarpið Lyndin biðir fyri hvørjum brotnum køliskápi, sum um tað skuldi gjørt himmalferð teirra lættari. Um tað sum gongur fyri seg í hasum varpinum ikki er blasfemi, so má onkur endiliga greiða mær frá, hvat er blasfemi og ikki.

Nei! Í roynd og veru er átrúnaður eitt persónligt val, og lat tað verða persónligt - eitt persónligt samband við tað valið, sum nú einaferð ger lívið lættari at liva, ella øvugt, alt eftir hvør tú er.

Nietzche valdi at siga at "Gud er deyður". Tað var nú hansara val. Eg velji at siga, at hugtakið Gud er relativt, og at tað altíð er ein spurningur um sjálvsøkni, hvørjum hami hetta hugtakið so vísir seg í. Tað er líkamikið um tú sannførir teg sjálvan í gerningum ella í orðum, so er tað altíð tín egni vinningur/samvitska sum stendur uppá spæl, um so talan er um onkran, sum sigur seg at hava fingið gulltenn, um gullstøv dryppar úr Bíblium, ella um blind fáa sjónina aftur.

Vit eru øll ein partur av einari kristnari uppaling, og áttu vit tí øll at kunna liva saman, uttan mun til, um vit hoyra til tann partin av Føroya fólki sum brúkar sína tíð, at søkja onnur virði enn tey átrúnaðarligu, ella um vit hoyra til tann partin av Føroya fólki, sum brúkar sína tíð uppá, at sannføra hini, at tað sum klapparar gera, er lóg og rættur, og tí skulu øll halda seg til henda lóg og rætt, annars... Hvussu er tað.

Tað er betri at hava ein dupultan moral, enn ein einkultan. Tí so er gjørligt at siga øðrum, at tey eru andaliga avsporaði, og samstundis dyrka sín materiella ágóða. Tað er í hvussu so er ongin av hesum andaligu retorikarunum, sum skal siga mær, hvussu mín samvitska skal hava tað, um eg velji at gera okkurt, sum ikki passar inn í teirra smalsporaða hugsanarhátt.

Og eftir grein, sum stóð í Dimmu, um akkurát hetta evni, síggi eg, at tey hava stovnað eitt felag sum eitur "Karisma". Hesi hava sett sær fyri at umvenda alt Føroya fólk, um teir so skulu tala í tungum. Eg síggi longu fyri mær fólk við himmalvendum eygum og einari ordans "Karisma".



**EIN AMATØRUR VITNAR. Eg eri javnaðarmaður - og eg eri eisini sambandsmaður, sigur Gunnar Hoydal í hesari røðu, hann helt á Café Natúr hin 14. februar, har hann rannsakar seg sjálvan í ljósinum av tí, sum býr innast í hvørjum føroyingi: frælsi, samband og brøðralag**

# Gunnar Hoydal:
# Eg eri javnaðarmaður

RØÐA

*Gunnar Hoydal*



*Gunnar Hoydal: Takið undir við tí, sum er innast inni og veljið frælsi, samband og brøðralag*

*Mynd Jens Kristian Vang*

Ein segði við meg henda dagin: Eru tað tríggir, sum standa saman í føroyskum politikki, so eru tað Rip, Rap og Nyrup. Onkur mundi vera bilsin tann søguliga dagin, 17. mars í fjør, tá ið Nyrup fór av fundi, sum hevði verið avtalaður og fyrireikaður í tvey ár og vendi sær einsamallur til fjølmiðlarnar. Tá avdúkaði hann fyri okkum, hvørja virðing hann hevði fyri føroyska landsstýrinum, føroyska løgtinginum og føroyingum yvirhøvur. Men hann var ikki einsamallur, tí aftan fyri seg hevði hann Rip og Rap, sum klappaðu hart, og sum síðani ikki hava forsømt ein einasta kjans at syngja í sama kóri, sum hann. Teir taka fult og heilt undir, og viðhvørt kann tað minna um hesa gomlu teknirøðina, sum tá æt Anders And: Rup segði fyrsta partin av einum setningi, Rip segði tann næsta, og Rap gjørdi setningin lidnan.

Nú hevur hann gjørt tað aftur: At siga við okkum einaferð enn, at vit kunnu gera akkurát, sum vit vilja. Vit kunnu semjast um hetta ella hatta, atkvøða so ella so, men tað eru teir, sum seta treytirnar. Og fagnaðurin hjá teimum, sum vilja hava stikið at standa, hetta heilaga stikið, sum teir kalla sína "smertugrensu", hevur verið hareftir hesa seinastu vikuna, síðani Nyrup segði 4 ár: "Skilja tit tað nú?" siga teir. "Tað nyttar einki, hvat tit siga og halda og kanna og gera og ætla. Tit hava ikki skilt, hvat tað veruliga valdið er, tit eru reinir amatørar, naiv, bláoygd og láturlig." Bara tað at hugsa um fullan avgerðarætt og fulla ábyrgd skal revsast líka hart og vera líka so dýrt sum at taka henda rættin, segði Nyrup. Og meiningarkanningin, mitt í skelkinum, tyktist at vísa, at valdið fær altíð rætt. Í fyrsta umfari í øllum førum.

So nú er stundin komin hjá øllum amatørum og øllum blá- og reyðoygdum droymarum at rannsaka seg sjálvar. Tað er ikki lætt, og eg má viðganga fyri mær sjálvum, at eg eri ein av teimum, sum nú í nøkur ár havi sæð nýtt áræði, nýtt treysti og eitt heilt øðrvísi og miðvíst arbeiði í føroyskum politikki aftan á øll árini við svansi oman á svans. Eitt arbeiði fyri at lýsa fyritreytir og møguleikar, eitt arbeiði, aftan á eina hálva øld við tómum tosi, at skapa eitt eftirfarandi støði at standa á, eitt støði at tosa útfrá og eitt støði at vera ósamd útfrá. Ella havi eg bara droymt tað?

At rannsaka seg sjálvan er serliga ringt beint nú hjá einum amatøri, sum samstundis er bæði javnaðarfólk og sambandsfólk. Ein sovorðin amatørur eri eg.

Eg eri javnaðarmaður. Tann stóra kollveltingin, sum fór um Europa í farnu øld er ikki endað. Frælsi, javnaður og brøðralag, øll tann rørslan, sum lyfti tey fátæku og tey kúgaðu upp úr djúpari neyð og gjørdu tey til fullar, javnsettar borgarar í ein opnum, fólkaræðiligum samfelagi, tann rørslan endar ikki í Bryssel ella á børsunum í New York, London og Tokyo. Hon er ikki endað í tí floyminum av ríkidømi, sum hevur gjørt fólkið í vesturheiminum til heimsins gribbar. Tí einaferð, um ikki so langa tíð, fara eisini vit at síggja, at okkara ríkidømi kemur úr neyðini hjá øðrum. Neyðin í ídnaðarlondunum tá, henda neyðin, sum skapaði javnaðarrørsluna, stendur nú í øllum heimsins fátæku londum, størri, ræðuligari og meira umfatandi enn nakrantíð. Fæloysingarnir eru nú so nógvir í tali og neyðin so djúp, at hvørki olmussur ella verjugarðarnir hjá EU ella rakettskjøldurin hjá amerikanarum muna nakað afturímóti. Tey fara at krevja sín rætt, tey fara at krevja, at eyðræningin hjá teimum ríku og sterku heldur uppat, og at allur heimurin fær frælsi, fær javnaða og brøðralag. Eingin kann longur vera javnaðarmaður bara í sínum egna landi.

Eg eri sambandsmaður. Eg eri heitur fyri øllum góðum sambandi við Danmark, við tað danska ríkið, við tað danska fólkið, við danska mentan, list, gransking, kunnleika og dugnaskap. Vit hava nógv at læra frá teimum og frá so mongum øðrum við. Eg eri heitur fyri sambandi við Norra, Svøríki, Finnland, Ísland, Grønland, Skotland, og eg eri heitur fyri sambandi út um allan heim. Sambandið er onnur stóra kollveltingin, og heldur ikki hon endar endar inni í verjuskansunum hjá teimum ríku ella í tykisheimunum, tí tóma virtuella rúminum, sum tað ljóðar at øll, ið eiga pengar, skulu sleppa at spæla sær í um stutta tíð. Tvørturímóti síggja vit byrjanina til sambond, sum fara egnar leiðir og heilt aðrar leiðir enn tær, sum Microsoft og Pentagon hava ætlað. Leiðir, sum fara at bróta reglur og vald niður og skapa sambond í heilt smáum og virknum eindum, frá hond til hond og frá hjarta til hjarta. Eingin kann longur vera sambandsmaður bara heima hjá sær sjálvum.

At hugsa sær eina øðrvísi verð, enn hana vit kenna, er naivt, fáa vit at vita. At hugsa sær aðrar treytir, enn tær, sum vit so leingi hava góðkent at onnur seta okkum, tað er bláoygt, sigur Rip. Tað er at skapa stríð og ótrygg-leika, sigur Rap. So latið okkum fáa amatørarnar burtur og teir professionellu aftur. Soleiðis siga teir, sum eru javnaðarmenn bara í sínum egna landi og sambandsmenn bara heima hjá sær sjálvum. Teir hugsa kanska um professionalismuna hjá tí fyrra landsstýrinum ella hjá teimum ráðandi upp gjøgnum alt svansið ("Tað er lætt at vera bakklókur", var tað einasta oddamaðurin í meira enn 20 ár hevði fingið burtur úr løgtingsfrágreiðingini um 80-árini). Latið teir professionellu sleppa framat. Tá verður aftur trygt, siga teir, og tá verður aftur friður innan fyri tað stikið, sum tær mongu ríkisgávurnar seta uttan um okkum øll.

Jú, kanska kann hetta stikið haldast uppi enn eina tíð við harraboðum og hóttanum. Men tað fer av sær sjálvum, fyrr ella seinni, tí verðin er broytt. Og tað fer fyrst og fremst, tí at eitt nýtt treysti tók seg upp, ein nýggjur hugur og eitt virkið arbeiði at skapa eitt nýtt og trygt grundarlag í staðin fyri ta mórruna, ta ógreiðuna og tann mjørkan, sum vit hava gingið í so leingi.

Tað nýggja stríðið fyri frælsi, javnaði og brøðralagi er byrjað. Borgirnar verða kringsettar, tað sameinda og veruliga heimsvaldið, WTO, IMF, Heimsbankin og hvat tað alt eitur, fær ikki hildið sínar fundir í friði, rópini standa í gøtunum. Kravið um, at spekulantarnir skulu skatta, hvørja ferð teir spekulera milliónirnar og milliardirnar úr einum gjaldskála í ein annan, veksur um øll lond, og kravið er, her sum har, rættindi og rættvísi heldur enn olmussur burtur av tí rænda avlopinum. Her eru milliardirnar av heimsins fólkum, tey vilja ikki vera trælir longur. Men valdið sigur, at tey eru naiv og bláoygd, tey hava einki skilt.

So takið undir við Rip, Rap og Nyrup og veljið tað professionella valdið. Ella takið undir við tí, sum er innast inni, og veljið frælsi, samband og brøðralag.